# Reytt er ikki altíð reytt

Tað er ikki bara sum at siga tað at vera til gongu í næststørsta norska býnum, Bergen. Ein krevur av sonnum at ansa sær, tí tað eru ikki øll ið skilja, at neyðugt er at steðga fyri reyðum ljósi.



FERÐSLA

*Nógv ferðsla er í Bergen, men bæði bussførarar og ikki minst fótgangarar mugu ansa sær. Sambært heimasíðuni hjá ferðavinnuni eru ikki allir bussførarar eins og hesin, ið steðgar fyri grønum "manni"*

Mynd: visitbergen.no

Talan er í hesum føri um bussførarar og fótgangarar, sum taka stórar kjansir við egnari trygd og trygdini hjá hinum.

Tað í roynd og veru er ikki ólógligt at ganga tvørtur um vegin, um "maðurin" er reyður, men at tað er revsivert at koyra framvið reyðum ljósi.

Fyri at gera vart við hesa heldur óhepnu støðuna roynir heimasíðan hjá ferðavinnuni í Bergen – www.visitbergen.no – at vísa fólki á tað sjálvsagda í ferðslulógini um, hvat bilførarar skulu gera. Orsøkin til hetta er, sum tey siga, at nakrir bussførarar í Bergen eru til stóran vanda fyri fótgangarar í býnum.

Lagt verður tó aftrat, at teir allarflestu bussførararnir koyra sum teir skulu, men at tað eru nakrir teirra sum bróta gamlan sið.

Fyri at skera tað heilt út í papp, biður heimasíðan tí tey ferðandi snøgt sagt um at rokna við, at ein bussur ikki steðgar fyri teimum. Og við bussførararnar siga tey hinvegin, at ferðafólkini vænta at teir steðga fyri reyðum, soleiðis at ein óræddur kann fara tvørtur um vegin.

Lagt verður tó aftrat, at hýruvognarnir fylgja ferðslureglunum munandi betri enn starvsfelagar teirra í bussunum.


